## DAGSINS MEINING

# Avbjóðingar fyri framman

Tað var ein varin løgmaður, ið á ólavsøku gjørdi viðmerkingar til stóru avbjóðingina, sum oljuleitingin við Føroyar er. Hann legði upp til, at føroyingar skulu ikki vera so vísir í, at olja verður funnin longu í summar og vísti til royndir aðrastaðni. Rætt er at royndir aðrastaðni vísa, at tað skulu borast nógvir brunnar, áðrenn rakt verður við olju. Tá oljuleitingin byrjaði í Noregi vóru feløgini við at gevast, tá nakrir tredivu brunnar vórðu boraðir, tá Phillips brádliga rakti við olju. Vestan fyri Hetland vórðu boraðir meira enn 150 brunnar, áðrenn rakt varð við fyrstu lønandi feltini í 90-unum. Út frá hesi sannroynd hevur løgmaður rætt, tá hann leggur upp til ikki at hava alt ov stórar vónir longu undir fyrstu boringunum.

Hinvegin er tað ein sannroynd, at sjáldan hava oljufeløg gjørt so stórt fyrireikingararbeiði sum til hesar boringar. At oljufelt eru funnin í somu jarðfrøðiligu løgum stutt frá føroyska landgrunninum er eisini orsøk til, at feløgini eru bjartskygd. Tað eisini ein sannroynd, at jarðfrøðin kennir ikki mørk. Tí kann man væl siga, at forarbeiðið til hesar boringarnar er longu gjørt, og tað eru fundini hinumegin markið, Foinaven og Schiehallion. Og tá talan helst er um somu jarðfrøðiligu løg okkara megin markið, skuldi møguleikin fyri at gera fund av Foinaven og Schiehallion slagnum verið tilsteðar.

Tí er eisini rætt at vera realistisk og innsíggja, at møguleikin fyri at finna olju í ár hóast alt er rættiliga stórur. Og tað er slíkan veruleika vit mugu fyrihalda okkum til, tá sagt verður, at vit mugu fyribyrgja óhepnum avleiðingum av oljuni. Tí er tað áhugavert at vita, hvat okkara politikarar hugsa og halda um komandi útviklingin sum eitt nú at taka støðu til spurningar løgmaður reisir: hvussu skal framleiðast og skal olja í land í Føroyum! Og aðrir spurningar koma so í kjalarvørrinum: hvussu við bústaðarmøguleikum, ansingarplássum ol., tá olja er funnin og eftirspurningurin fer at vaksa!

“Útlendsku” oljufólkini, sum fara at koma til Føroya, verða í stóran mun okkara egnu landsmenn, sum hava nomið sær útbúgving í útlandinum. Hvørja ávirkan fara hesi t.d. at hava á longu hart fyrispenta húsamarknaðin? Hetta eru spurningar, sum vit her í blaðnum fara at viðgera í næstum. Løgmaður hevur rætt, tá hann sigur, at vit skulu ikki kanna okkum bitan ov tíðliga, men hinvegin eiga vit eisini at taka tað í størsta álvara, at vit kunnu gerast oljutjóð í næstu framtíð. Og tað setir krøv til okkum øll, men fyrst og fremst til politikararnar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til Vestegnens Zoneterapeutskole

**Ó.J.Rólantsson**
*Rás 2*



Í sambandi við lesarabræv í Sosialinum 20. juli, har eg í sambandi við sending á Rás 2, av Sven J. og Lillian Holst verði skuldsettur fyri ikki at hava gjørt ”seriøs recearch”, og at siga nakað ósatt um Vestegnens Zoneterapeutskole, skal eg gera hesar viðmerkingar.

Vestegnens Zoneterapeutskole varð ikki nevndur við navni í hesi sending. Men frammanundan gjørdu vit nógv research um zonuterapiútbúgvingina sum heild, eisini tilboðunum um útbúgving á Vestegnens Zoneterapeutskole.

Nevndi skúli lýsti við eini útbúgving, ið tók 200 tímar innanfyri 1 ár. Okkum kom í hendi eitt ”Kursusprogram — Uddannelse til zoneterapeut gennem intensiv og effektiv undervisning”. Afturat hesum var eitt yvirlit yvir, hvussu undirvísingin fór fram 9 vikuskifti gjøgnum eit heilt ár. (16 tímar pr. vikuskifti geva kortini bert 144 effektivar undirvísingartímar!)

Hetta ”Kursusprogram” gevur teimum, ið lesa tað, fatan av, at eftir hesi skeið er ein fullbúgvin zonuterapeutur, og at ein fær diplom eftir próvtøkuna, sum er 10. vikuskiftið. Grundgjaldið fyri næmingarnar var 18.000,- kr. Ongi upptøkukrøv vóru til næmingarnar.

Hvussu hesin skúli var skipaður annars, vitstu vit lítið um. Hann eitist at vera elsti skúli av sínum slag í Noregi, hann hevur adressu í leigaðum húsum við Sundsvegin, rektarin býr á Karlslunde Strand í Danmark, og sjefkonsulenturin, sum er norðmaður, býr í Føroyum.

Og sjefkonsulentin, sum eisini undirvísir, tosaðu vit við tvær ferðir undan nevndu sending, m.a. fyri at vita, um hann var áhugaður at luttaka í seinni sendingum um alternativa ella supplerandi heilsurøkt. Tað var hann.

Undir kanningunum av zonuterapiútbúgvingini sum heild, varð eisini spurt hjá almennu myndugleikunum um nevnda skúla. Undirvísingar- og Mentamálastýrið svaraði, at stýrið ”hevur ikki givið Føroya Náttúrumedisinsku Klinikk góðkenning sum zonuterapiskúli, og ei heldur er nakar fyrispurningur um slíka góðkenning at finna í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum!”

Stýrið vísir eisini á, at nevnda klinikk ”lýsir við góðkendari undirvísing innan zonuterapi við 200 undirvísingartímum. Hetta verður sett móti 665 undirvísingartímum hjá góðkendum zonuterapiútbúgvingum í Danmark og øðrum evropeiskum londum!”.

Harnæst kannaðu vit eisini partafelagsskrásetingina, vinnuloyvi og mvg-frítøku hjá teimum, ið reka tílíka vinnu í Føroyum. Her er serliga áhugavert at leggja til merkis, at Toll og Skattstova Føroya heldur seg til donsku mvg-lóggávuna (eftir tilmæli frá Sundhedsstyrelsen), sum bara letur mvg-frítøku til teirra, sum hava fullført útbúgvingina hjá FDZ ella á tilsvarandi støði. Tað merkir, at kravið til útbúgvingina liggur um 665 tímar. (FDZ, sum ikki hevur góðkent Vestegnens Zoneterapiskole, lýsir nú við 684 tímum!)

So er heilt nátúrligt hjá einum tíðindamanni at seta spurnartekin við, um fyrrnevnda útbúgving heimilar einum at kalla seg zonuterapeut. Tann spurningin fekk sjefkonsulenturin eisini, men hann vísti til, at skúlin ”endvidere” kann bjóða eina eyka útbúgving í eitt ár, svarandi til sjúkapleygustøði, og so kann ein, sum tað eisini stendur í faldaranum hjá skúlanum, fáa eitt ”samlet diplom”. Henda eykaútbúgving verður sambært prísilistanum hjá skúlanum í høvuðsheitinum avgreitt sum brævskeið. Harvið kann ein møguliga náa teimum kravdu tímunum fyri mvg-frítøku.

Men í faldaranum stendur stutt og greitt, at ”den praktiske del af kurset omfatter 200 undervisningslektioner. Du vil her blive undervist i alt, hvad du senere har brug for at vide, når du starter din egen selvstændige klinik!” Ein kann ikki skilja hetta øðrvísi, enn at ein eftir eitt tílíkt skeið er fullbúgvin zonuterapeutur — men hetta er langt frá krøvunum hjá Toll & Skatt fri mvg-frítøku.

At tey bæði Holst nú siga, at ”zoneterapeutuddannelsen på vores skole består af ialt 660 timer” er nakað heilt nýtt í hesum viðfangi, tí tað framgongur ongastaðni av tí, tey hava sent út av tilfari í Føroyum, og samsvarar als ikki við tað ”kursusprogram”, tey hava lýst við.

Ivist onga løtu í, at Oda Andreasen kann svara fyri seg sjálva. At hon var vald til hesa fyrstu sendingina var fyrst og fremst orsakað av, at hon er væl kend, vælumtókt og viðurkend, eisini av almenna heilsuverkinum. Harafturat hevur hon eina drúgva og góða útbúgving á fleiri heilsuøkjum, og svaraði útbúgvingarkrøvunum til mvg-frítøku fyri fleiri árum síðani.

# Fólkafundur á Skarðinum

Fuglafjarðar Fornminnisfelag fer aftur í ár at skipa fyri fólkafundi á Skarðinum millum Fuglafjørð og Hellurnar.

Fundurin verður komandi sunnudag – tann 5. august. Eins og øll onnur tiltøk, sum verða hildin undir opnum himli í Føroyum, veldst tiltakið um veðrið.

Í ár verður tað Sólbjørn Jacobsen, fyrrverandi stjóri á Telefonverkinum, sum fer at halda fjallarøðuna.

Ferðin niðan á Skarði byrjar við Kunningarstovuna í Fuglafirði kl. 14.00 sunnudagin. Eftir fundin er høvi at fara niðan á Rustakamb.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.